

*Fjákuta tosið um at KÍ við vilja fór at geva B36 stigini, soleiðis at klaksvíkingar harvið kundu tryggja sær pláss í UEFA Cup varð gjørt til skammar av KÍ, sum ímóti stríddist tað, teir megnaðu*
*Mynd: Aleksandar Djorovic*

# B36 í bestu støðu sum tað ber til

**HB hevur møguleikan at siga takk fyri seinast, men mest sannlíkt er tað, B36 fer at siga takk fyri 1991**

SAMANUM
*Jóannes Hansen*

B36 vann, og GÍ fekk einki. Soleiðis var veruleikin, tá klokkan nærkaðist fimm sunnudagin. Stutt frammanundan vendi tað hinvegin. Tá var KÍ komið á odda í Klaksvík ímóti B36, meðan tað framvegis var javnleikur í Gøtu.

Mátin, sum B36 vann upp á, var ikki lítið átøkur honum, sum teir fyri trimum vikum síðani ognaðu sær øll stigini í Miðvági. Tá tað var farið undir síðsta korterið, var mótstøðuliðið á odda, og tað tóktist sum um, at B36 einki skuldi fáa. Næstsíðsta sunnudag ímóti B68 í Gundadali bendi alt á, at tað skuldi enda málleyst. Men allar tríggjar ferðirnar hevur B36 verið omaná síðstu løtuna. Soleiðis var tað, tá teir í 1997 vunnu FM, soleiðis var tað, tá HB í 1998 vann FM, og tá KÍ í 1999 og VB í fjør vunnu meistaraskapin vórðu dystirnir ofta ikki avgjørdir komandi meistaraliðnum til fyrimunar fyrrenn í síðstu løtu.

Fjákuta tosið um at KÍ við vilja fór at geva B36 stigini, soleiðis at klaksvíkingar harvið kundu tryggja sær pláss í UEFA Cup varð gjørt til skammar av KÍ, sum ímóti stríddist tað, teir megnaðu.

## Ynskistøðan

Hjá B36 og B36 viðhaldsfólki lagaði vikuskiftið seg so væl, sum tað kann hugsast. Verturin man liggja á, at tað ikki hekk so ógvuliga væl saman í Klaksvík, og at tað fyrstu 80 minuttirnar ikki sá serliga sannførandi út. Tað, sum nú telur, er, at tað eydnaðist at fáa øll stigini við aftur til Havnar.

GÍ megnaði ikki at fáa nakað ímóti NSÍ. Einki skal takast frá NSÍ avrikinum, men tá GÍ verður sammett við B36 er breiddin í spælarahópinum ikki tann sama, og tað hevur týdning. Skaðar raka dygt, og so tóktist tað hesa ferð, sum um fleiri av gøtumonnunum framvegis vóru troyttir eftir dystin mikukvøldið ímóti HB. At tann 2. hálvleikurin gjørdist nógv strævnari, enn tað var neyðugt, kom illa við sunnudagin.

Úrslitini í 16. umfarinum hava við sær, at B36 er í sannari ynskistøðu. Nú kunnu teir komandi sunnudag avgera meistaraskapin á heimavølli, og tað kann ikki vera betur. Serliga tá HB er mótstøðuliðið!

Meistaraskapurin í 1997 varð vunnin í Vági. Í 1991 hevði B36 møguleikan at vinna FM í Gundadali. HB var mótstøðuliðið, og teir syrgdu við 1–1 javnleiki fyri, at tað ikki var B36, men heldur KÍ, sum henda sama dagin tapti 2–1 í Gøtu, sum vann FM heitið.

Í fjør hevði HB allar møguleikar at vinna FM. Men ta ferðina var tað B36, sum við 2–2 javnleiki í næstsíðsta umfarinum spældi HB eitt puss, meðan B36 ikki megnaði at gera nakað við VB, tá teir í síðsta umfarinum komu í Gundadal.

Sunnudagin fer HB at gera sítt til at útseta B36 veitsluna. Avrikið í fyrsta sigrinum síðani 1. juli, tá HB vann ímóti FS Vágum, var einki serligt, men 1–0 sigursmálið ímóti EB/Streymi hjá 38 ára gamla Gunnari Mohr, sum er grivin framaftur, eftir at hann ikki hevur spælt á besta liðnum síðani 1997, mundi kennast serliga kærkomið. HB er framvegis á sjeynda plássinum, men við fullari úrtøku í tveimum teimum seinastu umførunum kunnu teir lyfta seg upp um miðjuna. Tað er ikki nøkur ynskistøða hjá HB. Hana eiga teir í B36, sum ivaleyst – í tí loynda sjálvandi! – fara at fyrireika tað heilt stóra til komandi sunnudag.

Sjálvandi verður tað stuttligast hjá B36, um teir vinna FM við sigri á grannunum. Men teir kunnu eisini gerast meistarar sunnudagin, sjálvt um teir tapa. B36 vinnur undir øllum umstøðum FM, um B68 sunnudagin megnar at fáa stig ímóti GÍ.

## Millumvøran

Á Toftum høvdu teir undan kappingarbyrjan ivaleyst vónað, at B68 skuldi vera við í FM kappingini. Tað hava teir ikki megnað, og tað hevur sjálvandi havt við sær, at tað ikki hevur verið so spennandi hjá toftamonnum, sum tað kundi havt verið. Men tað skal vita heilt illa við, um bronsukrónurnar ikki verða vunnar. B36 sigurin í Klaksvík hevur ivaleyst við sær, at triðja plássið hjá B68 ikki fer at bera UEFA luttøku við sær, men heldur Intertoto Cup pláss.

VB er nú einasta liðið, sum kann hótta triðja plássið hjá B68. Við stórsigrinum ímóti B71 vístu vágbingar, at teir enn stríðast fyri 3. plássinum.

Í Runavík hava teir ikki fingið tað burturúr, sum teir høvdu vónað. Flotti sigurin í Gøtu hevði við sær, at NSÍ lyfti seg fram á fimta plássið, og teir hava framvegis møguleika fyri at endurtaka fjórða plássið frá í fjør.

KÍ í Klaksvík plagar at vera ov stórur biti hjá teimum flestu. Soleiðis hevur tað ikki verið í ár. Tapið ímóti B36 var tað fjórða hjá KÍ á heimavølli í ár.

HB slapp sunnudagin undan øllum teoretiskum tosi um niðurflyting. Kanska teir kunnu lyfta seg eitt ella tvey pláss upp, men undir øllum umstøðum er talan um eitt sera vánaligt kappingarár. Ikki minst tá havt verður í huga, hvussu ljóst alt sá út í bólkaumfarinum í steypakappingini.

Stóra málið hjá EB/Streymi var sunnudagin at fara úr Gundadali við øllum stigunum. Tað eydnaðist ikki, og so er spurningurin, hvussu tað fer at hilnast ímóti VB og NSÍ. Men eingin kann taka frá Berguri Magnussen og hansara monnum, at teir hava verið eitt gott íslett í bestu deildini.

## Í leysum lofti

Spurningurin um niður– og uppflyting hongur framvegis í leysum lofti. Vágamenn gjørdu einki um seg á Svangaskarði, og tað sær svart út hjá teimum. Sandoyingar gjørdu heldur einki um seg í Vági. Teir munnu fyrst og fremst dúva uppá, at FS Vágar einki fer at fáa afturat.

Annað av hesum liðunum skal niður í 2. deild, og hjá hinum verður kappingarárið longt við tveimum dystum. Hvørjum dystirnir verða ímóti er framvegis púra opin.

ÍF hevur mesta partin av árinum verið besta boðið upp á beinleiðis uppflyting, men tepra tapið á heimavølli ímóti Skála hevur við sær, at nú skulu fuglfirðingar hava hjálp frá bæði sumbingum og klaksvíkingum, um teir við sigri í Runavík skulu flyta upp. Tað er lítið sannlíkt, og avrikið leygardagin bar avgjørt ikki boð um, at ÍF hevur nakað at gera í bestu deildini.

Tað eru bara tríggjar vikur síðani, at TB tapti 5–0 í Fuglafirði. Nú er TB besta boðið upp á uppflyting. Tað verður eitt øgiligt stríð í Sumba komandi leygardag.

Skálamenn hava ongantíð verið í bestu deildini. Eftir tepra sigurin í Fuglafirði hava teir framvegis møguleikan fyri tí, og teir tykjast trúgva uppá, at tað skal bera til. Skála hevur staðið seg væl ímóti oddaliðunum, meðan teir fleiri ferðir hava kiksað ímóti teimum lægru staddu, t. d. ímóti GÍ, sum leygardagin so at siga misti plássið í deildini. Leygardagin fáa teir á Skála vitjan av KÍ, sum er í niðurflytingarvanda. Tann dystin mugu teir á Skála vinna, og so verður spennandi bæði hjá teimum og hjá klaksvíkingum at frætta, hvusu tað fer at gangast hjá tvørámonnum í Sumba og gøtumonnum í Gundadali.

Í 1. deild eru tvey umfør eftir at spæla. Komandi sunnudag verður spælt soleiðis: B68–GÍ, FS Vágar –KÍ, B36–HB, EB/Streymur–VB og B71–NSÍ. Annan leygardag verður spælt soleiðis: GÍ–B71, KÍ–B68, HB–FS Vágar, VB–B36 og NSÍ–EB/Streymur.

Í 2. deild verður átjanda og seinasta umfarið á skránni komandi leygardag: Skála–KÍ, NSÍ–ÍF, HB–GÍ, LÍF–B36 og Sumba–TB.



VB-B71 6-1 (5-0)

# Avsmurdir sandoyingar

**VB sópaði allan iva til viks í fyrra hálvleiki, og eftir hetta skuldi tíðin bert fáast at ganga**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tá B71 í fjør vitjaði í Vági, var tað heldur óvæntað, at teir skuldu fara avstað við øllum trimum stigunum. At tað so seinni skuldi vísa seg, at hetta bert gjørdist ein av tveimum ferður, at vágbingar fóru stigaleysir av vøllinum, mundi tað vera fáur, sum grunaði tá, men tað gjørdi ikki bragdið hjá sandoyingum minni, at so varð.

## Gjørdu skjótt av

Sunnudagin vitjaðu sandoyingar so aftur í Vági, men hesa ferð var tað so langt ífrá, at teir fingu nakað sum helst við sær heimaftur.

VB var snøgt sagt oman á í øllum. Serliga í fyrra hálvleiki blástu teir sandoyingarnar um koll, og longu eftir góðum tíggju minuttum tóktist greitt, at her høvdu gestirnir einki at gera.

Sandoyingar løgdu annars sera varliga fyri. Allar helst í vónini um at binda væl fyri í verjupartinum, soleiðis at teir kundu verja tað stigið, sum teir høvdu við sær á vøllin.

Hendan ætlan helst tó ikki serliga leingi. Bert góðir sjey minuttir vóru farnir, tá Jón Pauli royndi seg við langskotið. Robert Cieslewicz var kvikur, tá hann hevði møguleika at avrætta skotið, og so var Waldemar í sandoyarmálinum seldur fyri fyrstu ferð. Lítla løtu seinni varð Predrag Zivkovic, sum annars júst hevur longt sáttmálan við VB, feldur, og eftirfylgjandi brotssparkið sendi Krzystof Popczynski trygt í netið. Til stuttleikar kann nevnast, at júst í B71 sigrinum í Vági í fjør brendi Krzystof brotsspark.

Pólverska málskjótingin var tó langt í frá liðug, hóast dysturin við hesum báðum málunum tóktist mest sum avgjørdur.

Marek Wierzbicki hevur áður roynst væl hjá sandoyingum, men tað kann so ikki sigast um hendan dystin. Marek var nevnliga maður aftan fyri tey bæði næstu VB málini. Fyrst sendi hann hornaspark beina kós í meskarnar, og síðani lyfti hann upp um Waldemar, tá hann slapp púra leysir móti málinum.



*Palli Augustinussen sendi VB upp á tennistøl, áðrenn B71 at enda slapp at minka um munin*

## Alt var avgjørt

Beint undan steðginum økti Birgir Jørgensen í 5-0, áskoðararnir á Eiðinum høvdu ivaleyst vónir um enn eina málveitslu, tá liðini komu út til seinna hálvleik.

Her gjørdist tað tó eitt sindur meira friðarligt. Liðini fingu bert eitt mál í part, men sandoyingar máttu bíða til Palli Augustinussen hevði økt upp í tennistøl, áðrenn Jónsvein Thomsen at enda slapp at skjóta eitt troystarmál.

## Ymsar lagnur

Sigurin – saman við tapinum hjá KÍ – merkti fyri vágbingar, at teir nú eru mest sum leysir á fjórð ovasta sessinum í landskappingini. Bronsuni kunnu teir neyvan røkka, men hinvegin er einki at ivast í, at ærukæru føroyameistararnir vilja prógva, at teir eisini í ár eru mentir at fáa eina góða endastøðu.

Hóast sjálv plaseringin neyvan kann betrast tað stóra, so kunnu vágbingar enn prógva, at stirðil er í teimum. Komandi vikuskifti skulu teir vitja uppflytararnar úr EB/Streymi, áðrenn oddaliðið úr B36 kemur á vitjan í seinasta umfarinum. Tað kann vera, at B36 longu tá hevur tryggjað sær meistaraheitið, men um so er, er einki at ivast í, at vágbingar ætla sær at bera flaggið høgt, áðrenn teir fara inn í skápið eftir meistarasteypinum.

Hjá sandoyingum er framvegis annað og meira enn æran at spæla fyri. Framveigs halda teir seg framman fyri vágamenn í botnstríðnum, men ivaleyst verður neyðugt við fleiri stigum, um tilveran í deildini skal bjargast. Tveir dystir eru eftir á skránni, og eru hesir báðir í Eysturoynni móti ávíkavist NSÍ og GÍ, og tá verður neyðugt við øðrvísi og betri spæli enn tí, sum liðið sýndi í Vági sunnudagin.

**Dysturin í tølum:**

**VB-B71 6-1 (5-0)**

**1-0:** Robert Cieslewicz 8
**2-0:** Krzystof Popczynski (br.) 12
**3-0:** Marek Wierzbicki 21
**4-0:** Marek Wierzbicki 35
**5-0:** Birgir Jørgensen 43
**6-0:** Palli Augustinussen 53
**6-1:** Jónsvein Thomsen 68

**Dómari:** Birgir Sondum (B36)

**VB:** Bjarni Johansen - Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen - Palli Augustinussen, Gisli Sveinbjørnsson, Marek Wierzbicki, Krzystof Popczynski, Jón Pauli Olsen - Birgir Jørgensen, Robert Cieslewicz

**B71:** Valdemar Nowicki - Jógvan Jón Petersen, Bernhard Petersen, Bjørn Thorsteinsson - Hans Jørgen Djurhuus, Ib Mohr Olsen, Eli Hentze, Jón Brekku, Sverrir Kjærbo, Svenning W. Hansen - Kári Nielsen




www.sosialurin.fo